UTTANRÍKISRÁÐIÐ
Ministry of Foreign Affairs

Føroya Løgting
Uttanlandsnevndin
Stílað: Jenis av Rana, formanni
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

3. Juni 2008

Viðvíkjandi "rossamálinum"

Á fundi við uttanlandsnevndina mánadagin 31. mars spurdi formaðurin í uttanlandsnevndini Jenis av Rana, hvørt uppskotið til broyting í felagsnevndaravgerð nr. 1/2001 var avmarkað til "rossamálið", ella um uppskotið fevndi um annað og meiri enn eina loysn á "rossamálinum". Formaðurin vísti í hesum sambandi á broytingarnar í art. 5 í felagsnevndaravgerðini frá 2001 um gjøld, og í art 7 um TRACES og ADNS.

Avrátt varð á fundinum, at landsstýrismaðurin skuldi svara setta spurninginum skrivliga, og verður tað gjørt við hesum brævi.

Høvuðsinnihaldið í uppskotinum til felagsnevndaravgerð eru – sum kunnugt - broytingar, ið eru tengdar at loysnini av trupulleikunum við innflutningi av rossum úr Íslandi, umframt at lagt verður upp fyri, at loyva flutningi av rossum millum Føroyar og ES.

Harumframt inniheldur uppskotið nakrar broytingar av meira yvirskipaðum slag, ið eru at meta sum tøkniligar dagføringar av felagsnevndaravgerðini frá 2001, og verða hesar broytingar lýstar í stuttum niðanfyri.

Broytingin av art. 5 er ein dagføring av gjaldskipanini fyri eftirlit á BIP støðum. Ein av fortreytunum fyri heilsufrøðiliga samstarvinum millum ES og onnur lond er, at gjøldini fyri eftirlit á BIP støðunum eru á leið tey somu, uttan mun til hvar eftitlitið verður gjørt. Síðani felagsnevndaravgerðina frá 2001, hevur ES broytt gjaldskipanina fyri eftirlit, og er ætlanin við uppskotinum at broyta felagsnevndaravgerðina frá 2001 samsvarandi. Broytingin fer at hava við sær at gjøldini fyri eftirlit í Føroyum koma at hækkað nakað.

Broytingin í art. 7 hevur við sær, at gamla kunningarskipanin millum heilsufrøðiligu myndugleikarnar í ES og Føroyum (og øðrum samstarvslondum) ANIMO verður avloyst av eini nýggjari skipan nevnd TRACES. ANIMO skipanin varð niðurløgd í 2005, og hevur tað gjørt tað trupult hjá føroysku myndugleikunum at halda fráboðanarskyldu sína, í sambandi við eftirlit av innflutningi, t.d. um ein last verður avvíst við eina BIP støð. TRACES skipanin, verður brúkt sum samskiftisamboð í samband við flutning av vørum millum marknaðaeftirlitsstøðir (BIP) v.m., og er TRACES ein munandi betri skipan enn tann gamla.

UTTANRÍKISRÁÐIÐ
Ministry of Foreign Affairs

Sum nevnt kann sum heild sigast, at umrøddu broytingar av yvirskipaðum slag, eru at meta sum tøkniligar dagføringar av felagsnevndaravgerðini frá 2001, ið ikki verða mettar at hava stóran uttanlands politiskan týdning.

Leggjast skal afturat, at Uttanríkisráðið vendi sær eftir fundin við uttanlandsnevndina til Vinnumálaráðið fyri at tryggja at omanfyristandandi svar samsvarar við teirra fatan av málinum, og hevði ráðið onki at viðmerkja.

Til tess at tryggja at *allir* smálutir við marknaðaeftirlitsstøðini vóru komnir uppá pláss, áðrenn farið var víðari við málinum setti Uttanríkisráðið harumframt Vinnumálaráðnum hesar spurningar við teldubrævið tann 11. apríl:

1. *Um rossabippurin er klárur at taka í nýtslu, so skjótt felagsnevndaravgerðin er undirritað?*

2. *Um svarið uppá sp. 1 er noktandi, nær rossabippurin so kann takast í nýtslu?*

3. *Hvussu nógv meta tit at loysnin av rossamálinum, sambært uppskotinum til felagsnevndaravgerð, kostar landinum?*

Vinnumálaráðið svaraði Uttanríkisráðnum tann 5. mai, at *"Rossabippurin kann vera klárur at taka í nýtslu í juni í ár. Kostnaðurin av rossabippinum er 300.000 kr til at keypa útgerð umframt eftirlit, sum er partur av eini ársløn hjá einum djóralækna."*

Av tí at peningur ikki var játtaður til tann partin av marknaðaeftirlitsstøðini, sum tað almenna sambært galdandi skipan fíggjar, t.e. útgerð umframt lønir, varð avgjørt at taka hendan partin av málinum upp í sambandi við endaligu viðgerðina av fíggjarlógini.

Við samtyktini tann 31. mai av fíggjarlógini fyri 2008, eru allar fortreytir til staðar fyri at málið kann verða avgreitt, og verður við hesum heitt á uttanlandsnevndina, um at taka málið uppaftur, vísandi til skriv mítt til nevndina, dagfest 25. mars 2008.

Vinarligar heilsanir

Høgni Hoydal

Høgni Hoydal
landsstýrismaður